LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprisur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

Bilur til sølu
Ein Toyota Carina 2,0 SLI til sølu, um hóskandi boð fæst. (Ein eigari) Árg. 03/97, 63.000 km, aut. gear. Við fylgja eisini 4 pikadekk á felgum og takboks.
217918

BMW 323i
Árg. 83. 155 hk, El-spegl, 15" alufelgur, K&N filtur, nýggja kamreim. Øll filtur, nýggjan tanga, bens.pumpu. Tuningsútstoyt, senkaður. Prísur. 12000
Tlf. 519689

DAEWOO TACUMA CDX (FAMILJUBILUR)
Árg. juli 2001, koyrt 72.000 km, el-rútar, el-spegl, klimaanlegg. Førarasetur kann snarast og leggjast niður til borð. Sleipikrók, takboylar, vetrardekk á felgum. Í sera góðum standi. Til sølu fyri 135.000 kr.
Tlf. 214487

GER KVETTI
Citroen ZX, árg. 96, koyrt 102.000 í sera góðum standi, við nýggjum dekkum, ongan x til seinasta sýn. Prísur 36.000 kr.
Tlf. 316552/583273

TOYOTA COROLLA 1.3
árg. 98, reyður, 4 hurðar, bert koyrt 34.000 km, er sera vælhildin, pikadekk fylgja við, til sølu fyri 80.000 kr.
Tlf. 510488

YNSKIST TIL KEYPS
Ein gamal Toyota Carina ynskist til keyps, árg. uml. 87.
Tlf. 282267

PEUGOT 106 DIESEL
Árg. 97. Koyrt 160.000. Sera væl fyri. kr. 45.000.
Tlf. 747480

VOLVO 360 GLT
árg. 87, bíliga til sølu.
Tlf. 255325/315971

PÍKADEKK TIL SØLU
185/65/14 á felgum. 175/70/14 uttan felgur.
Tlf. 571659

HYGG HER!
Til sølu eru tveir Opel bilar, ein Kadett og ein Ascona, nógvir nýggir eykalutir.
Tlf. 456094/756094

TIL SØLU
Nýggj Michelin dekk á nýggjum sportfelgum, stødd 195/45/15" passa til t.d. Honda Civic, Peugeot 206, til sølu fyri 4.500,-
Tlf. 222888

HYUNDAI ELANTRA 1.5 GLI
árg. 92, nýsýnaður, við radio og cd-spælara/box, 20.000 kr.
Tlf. 224910

TIL SØLU
Nissan Primera 2.0 Diesel, árg. 95, til sølu fyri 65.000 kr. Motorurin er nýliga skiftur, hevur 17'' sportfelgur, nýggj vetrardekk, cd-spælara, og er annars í góðum standi.
Tlf. 210809

HEILÁRSDEKK
2 Debica 185/70-14'', 2 Dayton 185/70-14'', í góðum standi, prísur 1.500,- kr. Áhugað kunnu ringja á
Tlf. 259335 (Tórshavn)

BMW 318 TDS COMPAQ
Árg. 96, km. 100.000. Í sera góðum standi, bíliga til sølu.
Tlf. 216869

TIL SØLU
Vinterdæk 195/70/15, næsten nye, 1500 kr.
Tlf. 444128

TOYOTA COROLLA
árg. 9/92 bíliga til sølu, 15" alufelgur, 3 pikadekk, cd-spælara, sýnaður í ár, er hvítur og sær væl út. Til sølu vegna flyting.
Tlf. 261595

OPEL ASTRA 1.7 DIESEL
Árgang 95 til sølu. Hevur 4 hurðar.
Tlf. 509897

PEUGEOT 106 1.5 DIESEL
Árg. 97, sera økonomiskur, fittur bilur, til søu.
Tlf. 508190

TIL SØLU
Um gott boð fæst verður ein grønur Peugeot 306 Hdi seldur. Bilurin er frá 06/99 og hevur koyrt 97.000 km. Hann hevur 17'' AEZ felgur, gott anlegg og takspoylara, alt hetta er nýtt. Hann er snøggur og væl viðfarin. Hann sæst á bil.fo. Fá meira at vita á
Tlf. 213790

SKUTARI TIL SØLU
Hálvt ára gamal skutari, í góðum standi, til sølu fyri einans 10.000 kr.
268088

KIA CARNIVAL
LX til 7 pers. frá 05/03 til sølu fyri 185.000 kr. Er silvurgráur og einans koyrt 22.000 km. Nýprísur er 267.000 kr.
Tlf. 333383 ella 258496

VW PASSAT DIESEL
st. car til sølu, árg. 94, koyrt 226.000 km, krevur smáar ábøtur, prísur 30.000 kr.
Tlf. 361646/250050

VW POLO 1.9 SDI
árg. 2003, kr. 150.000,- Nýprísur 170.000 kr.
Tlf. 272715

MOTURUR TIL SØLU
Ein Toyota Carina 2.0 motorur til sølu.
Tlf. 448990

HONDA CIVIC 1.5 V TECH
Bilurin er frá 10/98, koyrt 87.000 km., hevur fløgspælara, sportfelgur, eyka felgur við dekkum. Prísur 80.000 kr. Ringi á
Tlf. 333230

ALUFELGUR TIL SØLU
4 orginalar Opel Alu felgur við dekkum. Stødd 195 / 65 R 15 .
Tlf 513966/313966

TOYOTA CARINA 2.0 TD
við skaða til sølu. Koyrt 150.000 km, árg. 1996.
Tlf. 218051

TOYOTA COROLLA
árg. 89, sýnaður í sept. 2003, til sølu.
Tlf. 441460, best eftir kl. 17.00

SUZUKI SWIFT 1,6
árg. 90-91, koyrt 165.000 km, til sølu fyri hægsta boð yvir 7.000 kr. Sýnaður í juli. Nýggir eykalutir til ymiskar bilar. Ring og hoyr nærri um prísir.
Tlf. 522049

MERCEDES YNSKIST
1984-93, model 200 til 500, typa W 124 ynskist til keyps til eykalutir ella leysir lutir.
Tlf. 441335

VEGNA FLYTING
Er ein Volvo 340 GL til sølu. Sær væl út uttan og innan. Koyrir væl. Kr. 10.00. Sýnaður mars 2004.
Tlf. 263452

MITSUBISHI L300
árg. 89 - bíliga til sølu kr. 20.000,-
Tlf. 312003 - 283837

TOYOTA COROLLA
Galla 1.3i, árg. 95 til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 444844

4 GÓÐ DEKK
(Jeep) 33/12,5-15" við felgum (sum nýggj) til sølu fyri 4.500 kr.
Tlf. 219119

TUNINGSBOKS TIL SØLU
passar til allar HDi motor, ongantið brúkt.
Tlf. 213737

BMW 320i
árg. 86 og ein BMW 325i árg. 88 til sølu. Kunnu brúkast sum eykadeilir.
Tlf. 445065/223802

TIL BMW
ein leðurkabina til sølu, passar til 300 seriuna árg. 85-90.
Tlf. 445065/223802

Amboð

GRAVIMASKINUR
Til sølu.
Tlf. 332333

MINIGRAVIMASKINA
til leigu við ella uttan førara.
Tlf. 422215 / 217215

Arbeiði

VI ER EN
dejlig familie i Island. Vi er mor, 2 store piger og 2 friske drenge på knapt 2 og 4 ár. Vi søger en sød barneglad pige, atten ár eller ældre til at hjælpe os med det huslige og de 2 små drenge. Vi glæder os at høre fra dig. Med venlig hilsen Margret.
Tlf. +354 6615723, e-mail: margret@hotmail.com

E.F. MECHANIC
950 Porkeri
Tlf. 251996 ella 373860

EG ÁTAKI MÆR
vaskiarbeiði. Hevur hetta tín áhuga, so ring
tlf. 508850

ALT TIMBUR
og snikkaraarbeiði verður gjørt, stórt sum smátt, biligt og gott.
J.P.Træsmið Tlf. 583444

FÓLK SØKIST!
Sokt verður eftir fólki til fast arbeiði í Pizzakjallaranum í Havn at byrja skjótast tilber. Vinarliga ring
tlf. 553356

AU-PAIR I DANMARK
Vi er en dansk familie der gerne vil søge en færøsk Au-pair (ung pige i huset). Med venlig hilsen Pernille Strand, Dykkercenter Langeland, Klæsøvej 4, 5900 Rudkøbing. Hjemmeside: www.dykkercenterlangeland.dk
Tlf. +45 62511444/e-mail: kontakt@dykkercenterlang

ARBEIÐI YNSKIST!
24 ára gamal havnarmaður søkir arbeiði. Alt hevur áhuga. Hevur royndir innan alt arbeiði. Um nakar hevur brúk fyri honum, so ring
tlf. 317109 ella 509309

FRESING
Sokt verður eftir fólki við maskinum at fresa og sáa ein hektar av jørð. Landbrúk.
Tlf. 312641, Malan

VIT ÁTAKA OKKUM YMISK SMÁARBEIÐI
So sum laga garð, gera tún, pussa grund/garð, mála, smiða. Helst í Tórshavnarøkinum
Tlf. 312803 ella 257315

Barnaútgerð

VØGGA TIL SØLU
Ein vøgga sum er keypt frá Vøgguni, brúkt í 3 mán. til sølu fyri 1.200 kr. Ring á
Tlf. 254241

YNSKIST
Gongustólur og grulvigarður ynskjast bíliga til keys.
Tlf. 311033/227767

HVÍTT PUSLIBORÐ
Brio til sølu fyri kr. 350,-
Tlf. 321530

BABYSENSE
Alarmur, ið ansar andadráttinum hjá barninum.
Tlf. 373921

TVILLINGABARNASTÓLUR
til sølu, fyri kr. 2500,00. Rygglenini kunnu leggjast niður hvørt sær. Regnslag og flugunet fylgir við. Borðstólur at heingja upp á borð kr. 200,-. Shoppari kr. 250,-.
Tlf. 271690

BIL STÓLUR
Góðkendur bilstólur 0-13 kg. av merkinum »Chicco« til sølu.
Tlf. 311688 ella 211689

KOYRISTÓLUR
Brio koyristólur, kann vendast, bláur, hvítur og grønur, kalesju, við selum, 500 kr.
Tlf. 583195

KOMBIVOGNUR
Grønur Brio combivognur v/ lufthjólum, grátt alu. stell í sera góðum standi, nýprísur 5.200,- til sølu fyri 2.800,-
Tlf. 310305/582900

GERIÐ KVETTI!
Barnavognur (Skemman), babylift v/ dýnu og kodda, puslitaska, flugunet og regnskjól, alt í sera góðum standi, selist fyri einans 1500 kr. Bert brúkt til 1 barn.
Tlf. 508210

EMMALJUNGA
Svartur Emmaljunga Big Star barnavognur við lufthjólum, lift, puslitasku, regnslagi og eyka hjóli til sølu fyri 3600 kr. Vognurin er væl hildin, teldumynd kann sendast.
Tlf. 263991

BERBARUR BILSTÓLUR
myrkabláur v/ kalesju sum kann takast av til barn 0-9 mðr. til sølu fyri 300 kr.
Tlkf. 310068

TIL SØLU
Ryggberari v/ hjólum og kalesju til børn frá ca. 6 mðr. til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 310068

SVARTUR SIMO
barnavognur v/ lufthjólum, lift, selum og flugunetti, hevur svart stell og regulerbart handtak, bert brúktur til eitt barn. Prísur 3.500,-
Tlf. 372104 eftir kl. 17

BRIO STÓLVOGNUR: MYRKABLÁUR
Brio stólavognur, lítið brúktur, við nýggjum selli til sølu. Regnslag og net fylgir við. Til sølu fyri 2.500 kr. Nýprísur 5.000 kr. Ring
Tlf. 263835 ella 226445

Bátaútgerð

NEYST
og eitt 8 mannafar til sølu í Fuglafirði um hóskandi boð fæst.
Tlf. 444632

8-MANNAFAR
Frambygt 8-mannafar, smíða í Miðvági 1990. 26 HK Solé (1220 tímar), radari, litekkoloddi, plottari, VHF, radio, til sølu um hóskandi boð fæst
Tlf. 328029 ella 210829

GAMALT 10-MANNAFAR
við frambygdum glastrevjahúsi og lítið brúktum 22 HK Sabb motori, bíliga til sølu, hevur einki fiskiloyvi.
Tlf. 333129

SHETLAND FAMILY FOUR
bátur til sølu. 19, føtur. Hevur fastan motor og drev.
Tlf. 228150 (Grettir)

PAHANGSMOTORUR
5–10 HK, ynskis til keys.
Tlf. 311041 ella 581208

HUMMARALOYVI
Hummaraloyvi á Tangafirði ynskist. Ring
Tlf. 226661 ella 421585

Bingo

BINGO
Ársins seyðabingo hjá TBF, verður í Skúlahøllini í Trongisvági mánakvøldið 27. september kl. 19. 16 lomb at vinna.
Tvøroyrar Borðtennisfelag

GOTT BINGO
Verður í Ítróttarhøllini á Kambsdali leygarkvøldið 25. sept. kl. 17.30. At vinna verður m.a. eitt lamb, ein Apex-ferðaseðil, 2x500 kr. 1x1.000 kr. og 1/2 krov.
ÍF

BINGO
verður hósdagin 23. sept. kl. 19 í Pálsstovu. Full pláta 500 kr. Á lutaseðli er 2 x 500 kr. og tvey lomb. Bingola og eykaspæl verður. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kyndil

BINGO Á STRONDUM
Gott bingo verður á Strondum sunnudagin 19. sept. kl. 16.00. Kom og vinn tær ein Apex ferðaseðil fyri 2 við Maersk Air til Danmarkar. Burturlutað verður eisini eitt føroyskt krov. Eisini verða lúkur at lata upp.
Strálan

BINGO
verður í Pálsstovu sunnudagin 19. sept. kl. 16. Full pláta 500 kr. Á lutaseðli 3 x 1000 kr. Bingola, eykaspæl, koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

GOTT BINGO
verður í Tórshøll leygardagin 18. sept. kl. 20. At vinna m.a. á lutaseðli ræst krov til heystar, gávukort og nógv annað. Eisini eru eyka spøl.
Tórshøll

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu mánadagin 20. september, kl. 19. Nógvir góðir vinningar. Á lutaseðli m.a. gávukort á 2x500 kr. og 1000 kr. og seymimaskina.
Astma- og Allergifelagið

GOTT BINGO
verður í Framtíðini onskvøldið 29. sept. kl. 19.30. At vinna: Full pláta 400 kr. Drigið verður millum spølini. Eyka-eyka spæl verður.
Vágs Kappróðrarfelag

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtíðini mánakvøldið 4. oktober kl. 19.30. Full pláta 300 kr. Á lutaseðli m.a. tvey lomb. Drigið verður millum spølini.
K.F.U.M. Skótarnir

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði leygarkvøldið 18. sept. kl. 19.00. Á lutaseðli: Lamb í heyst.
Eldrafelagið Borgin

TVØROYRAR KLUBBI
Gott bingo verður í Tvøroyra klubba leygardagin 18. september kl. 19.30.
Nevndin

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtíðini mánakvøldið 27. sept. kl. 19.00
Kirkjukórið Ljómur

SUÐUROYINGAR
Rimmar seyðabingo verður í skúlanum í Trongisvági mánakvøldið 4. okt. kl. 19.00. 20 seyðir vera at vinna, umframt olja og annað gott.
Flogbóltsdeildin TB

BINGO
Gott bingo verður í VB-húsinum sunnudagin 19. sept. kl. 16.00.
Vágs Bólfelag

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 20. september. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á 1000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Bøkur

BRÚKTAR BØKUR
Hesar bøkur ynskjast til keyps at brúka í 3. g:
Religionshándbogen.
Flux (enskar stuttsøgur).
Det tredie rige.
Málláera.
Tlf. 266742

BØKUR
til heimaskipara og skiparaklassan til sølu.
Tlf. 213737

Burturm. /funnið

OYRALOKKUR
burturmistur. 14 krt. gull. Er ein ringur, sum 4 perlur eru innfeldar í. Innan stendur 585.
Tlf. 315907 eftir kl. 16

EFTIRLÝSING
Føroysk, maskinbundin, tøvd og seymað húgva, rávhít, ljósabrún og møguliga grá, bundin saman við tøvdum og seymaðum bandi ovast, burturmist í Hoyvíkar skúla ella har um leiðir hósdagin 9. sept. Tiverri onki navn í. Vil gjarna hava hana aftur.
Tlf. 318554 ella 263046

NESVÍK SUMMARLEGA 2004
Veit nakar um eitt Olympus Mju fototól, sum bleiv gloymt eftir á leguni í Nesvík 22. juli 2004 so ringið vinarliga á
tlf. 312029/212029

SILVUR RINGUR FUNNIN
Silvur ringur við mynstri oman á sum eitt liggjandi 8-tal við diamantum, funnin í Erling Jalsgøtu leygarnáttina. Er tað tin ringur, ring
315616 ella 222552

BURTURSMIST
Tann, sum av misgáum tók skeivan jakka á Cafe Natúr 8. sept., biðist vinarliga koma aftur við honum. Jakkin er av merkinum Five Seasons. Ein fartelefon og ein landsliðstroyggja lógu í lummanum.
Tlf. 373662 - 259062

EG HAVI MIST MÍN TRÚLOVILSISRING
burtur. Í ringinum stendur 16.05.2004, Tín Rúni. Hevur nakar funnið ringin, vinarliga ring
Tlf. 254704 ella 217023

SILVURARMBAND
funnið uttanfyri B68-húsið. Armbandið hevur 7 ketur, sum ganga saman í miðjuni, har ein perla, sum líkist einum diamanti er í miðjuni. Um tú saknar hetta armbandið, kanst tú ringja
tlf. 447677

Býli

HÚS Í FUGLAFIRÐI
Hús í Fuglafirði til leigu.
Tlf. 444383

ÍBÚÐ TIL LEIGU
At deila við ein trúgvandi mann í Havn. Allir hentleikar eru.
Tlf. 314808 ella 264903

HEYSTFRÍ?
Eg skal til Føroyar at ferðast í heystferiuni (frá 12.–24. oktober) og leiti eftir onkrum at búgva í hesar dagarnar. Um tit skulu til Árhus, kunnu vit býta um. Eg havi eina sera hugnaliga íbúð í miðbýnum í hugnaligum, barnavinarligum umhvørvi. Skulu vit ansa eftir uttapottum hjá hvørjum øðrum, so skrivið til:
urtapottur@ofir.dk

ÍBÚÐ Í KBH SØKIST
Okkum manglar eitt stað at búgva í í Keypmannhavn. Vit roykja ikki og gjalda til tíðina. Hava tit nakað at bjóða, so vinarliga ring á +4560873105 ella skriva á
andrasolsen78@yahoo.co.uk

HALDIÐ FRÍ Í RUNAVÍK
Ella gist eina nátt. Góð íbúð, 50 fermetrar, við øllum hentleikum, í hugnaligum umhvørvi, úti við Toftavatn, til leigu.
Tlf. 447451 millum kl. 8-10

HÚS Í SUNDALAGNUM TIL FRAMLEIGU
Fult møblerað við køksbúnýti, uppvaskimaskinu og frystiboks, køkur/stova, hjúnarúm, 2 kømur og kjallari við vaskimaskinu til framleigu til ikkiroykjara frá 1. nov. til 1. juli 2005 ella eftir nærri avtalu. Leigan er 3.900 kr. uttan ljós og htia. Skriva til Sosialurin, Boks 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 1920cc

HJÁLP!!!
Familja við 4 børnum leitar eftir íbúð/húsum til leigu í Havn. Húsini vit búgva í eru seld og vit skulu vera úti 1. okt.
Tlf. 270127

SETHÚS Í NORÐAGØTU
Til sølu um hóskandi boð verður givið. Hoyr nærri á
Tlf. +45 86300230

ELDRI HÚS Í SØLDARFIRÐI
til sølu um hóskandi boð fæst. Nýístaðndgjørd innan. Gott útsýni og barnavinarligt umhvørvi.
Tlf. 441337 ella 504543

ÍBÚÐ TIL LEIGU Í HAVN
frá uml. 15. okt. til tilkomið fólk. Stova, køkur, kamar, wc/brúsa, ætgongd til vaskimaskinu, leiga 3.500,- u/m. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1920/2

ÍBÚÐ TIL LEIGU
50 fermetra íbúð til leigu frá 1. okt. Liggur væl fyri á Frælsinum. Køkur, stova, kamar, baðirúm, gangur og durur, goymslurúm í kjallaranum. Kostnaður 5.500 við øllum.
leiga50@hotmail.com

HÚS TIL LEIGU
Hús (miðhædd + loft, garaga og hjallur) til leigu á Argjum. Loft: 4 kømur + wc/bað, miðhædd: gongd, wc, køkur, lítil stova + ein stór stova. Liggur út til kommunalan veg, beint við buss og skúla.kr. 6.500,- uttan ljós og varma. 2 mðr. depositum.(Kjallarin er úleigaður)
Ring 318275 eftir kl. 20.00

ÍBÚÐ SØKIST
Friðarligt par við einum barni søkir íbúð í Havn. Vit roykja ikki.
Tlf. 504046

SOS - ÍBÚÐ/HÚS YNSKIST
Vit eru ein familja (kvinna við 3 børnum), sum veruliga eru í íbúðarneyð. Eru álítandi, rókin og friðarlig. Er nakar, sum kann hjálpa okkum? Vinarliga ring
Tlf. 227951

ÍBÚÐ YNSKIST
Til kvinnu mitt í 30-unum. Fari væl um og havi fast arbeiði.
Tlf. 226852

KAMAR/ÍBÚÐ YNSKIST
av maskinmeistaraskúla næmingi. Royki ikki, fari væl um og gjaldi til tíðina.
Tlf. 226171

PAR
søkir hús/íbúð til leigu í Vágum. Fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 583562

ÍBÚÐ YNSKIST
Mamma við 2 børnum ynskir íbúð í Havn skjótast møguligt. Max 4.500 kr. pr. mánað. Fara væl um og gjalda rættstundis.
Tlf. 223339, Kristina

ÍBÚÐ YNSKIST Í HAVN
Vit eru 2 gentur í 20'unum, báðar hava fast arbeiði. Íbúðin skal hava 1 ella 2 kømur.
Tlf. 227112 ella 574214

ÍBÚÐ TIL LEIGU Í HAVN
At deila við ein trúgvandi. Allir hentleikar eru.
Tlf. 314805 ella 264903

HÚS YNSKJAST Á TVØROYRI
Hevur nakar eini lítil hús á Tvøroyri at leiga mær í eitt longri tíðarskeið. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,
Bill. mrk. 53.64.

LEIGA SAMAN Í HAVN?
80 fermetrar íbúð at deila við annað fólk. Allir hentleikar eru í íbúðini.
Tlf. 314805 / 264903

KAMAR Í KBH.
Uml. 16 fermetrar, atgongd til køk og bað, til leigu.
Tlf. 22937353

BÚSTAÐUR SØKIST
Kvinna og hálvvaskin genta søkja bústað. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,
Bill. mrk. 15.26

VERILSI SØKIST
Kvinna søkir verilsi íHavn skjótast gjørligt. Gjaldi til tíðina, fari væl um og eri friðarlig.
Tlf. 503912

ELDRI HÚS Í SKOPUN
til sølu.
Tlf. 361803 - 268064

GOYMSLURÚM YNSKIST
í Tórshavn. Vit søkja kjallaralokali ella líknandi til eykalutagoymslu. Vit skulu brúka í minsta lagi 100 fermetrar. Skal eisini brúkast sum handil.
Tlf. 522049/512190

SKRIVSTOVUHOLI TIL LEIGU
Uml. 60 fermetrar, nýggj hølir, í Vági.
Tlf. 573006

HÚS ELLA ÍBÚÐ Í NORÐURSTREYMI
Søkist til eina familju við einum handikappaðum drongi sum skjótast.
Tlf. 318405

ÍBÚÐ YNSKIST
Kvinna og hálvvaksin genta søkja bústað. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1619/6

2 KØMUR TIL LEIGU
Í Vesturbýnum við atgongd til køk, bað og vaskimaskinu. Nær við Læraraskúlan.
Tlf. 221158 ella 313799

ÍBÚÐ YNSKIST
Eg eri ein ung genta íð søki íbúð í Tórshavn. Havi fast starv og fari væl um.
Tlf. 229512/373758

VIT ERU UNGT PAR
við einum 1 ára gomlum barni sum ynskja eini hús ella eina íbúð til leigu í Sandavági ella Miðvági.
Ring 586058, Hans

KAMAR TIL LEIGU
Ert tú friðalig/ur og fer væl um, havi eg eitt kamar til leigu við atgongd til køk og bað 1. september.
Tlf. 316916 ella 506489

Dýr

ER NAKAR SUM VIL
hava meg. Ein Bordercollie tík manglar eitt heim vegna flyting. Ring á
Tlf. 254241

TVEIR SERA SPAKIR
Fittir og penir kettlingar. Eru klárir at flyta heimaífrá. Eru 7 vikur gamlir.
Tlf. 457555 ella 265425

CHINCHILLA
Ein chinchilla til sølu – við búri, sandkassa, húsi, matskál og drekkifløsku.
Tlf. 503373

EIN FITTUR KETTLINGUR
9 vikur gamal, verður latin djóravini.
Tlf. 211232/321225

REYÐ/HVÍTUR
kettlingur ynskist til hálvan desember. Ring skjótast ti ber til
tlf. 509267

TIL SØLU
Góð gásapør, ungarnir eru stórir.
Tlf. 252897

KETTLINGUR FUNNIN
Ein spakur svartur/hvítur kettlingur er tikin upp úti á Velbastaðvegnum. Tann ið saknar kettlingin kann ringja til
Tlf. 213777

BÚR TIL DVØRGA-HAMSTRARAUNGAR
Alt fylgir við, vatnhaldari, wc, hjól at renna í, hús + ull og sandur til botnin.
Tlf. 448595/256155

HEY
Vit eru 3 sera fittir kettlingar, ið eru klárir at flyta heimaífrá, vit latast bert til djóravinir.
Tlf. 312945

PUDDILHUNDUR
Ektaður puddilhundur til sølu.
Tlf. 582040

TVEIR SERA SPAKIR
Fittir og penir kettlingar. Eru klárir at flyta heimaífrá. Eru 7 vikur gamlir.
Tlf. 265425

DVØRGAHAMSTRARA-UNGAR
fáast fyri 50,- kr. stk.
Tlf. 321291/521291

HAMSTRARABÚR
til sølu fyri 150 kr.
Tlf. 228663 / 318663

SAÐIL
Lítið brúktur, íslendskur saðil til sølu. Vælegnaður til gongulog.
Tlf. 223473

HUNDEHVALP
En sød lille 8 uger gammel hundehvalp gives væk til hundevenligt folk.
Tlf. 224220

EIN 8 VIKUR GAMAL KETTLINGUR
Sera vakur á liti, dugir at eta/leppa, er reinligur, kann latast nú. Bert til djóravinir.
Tlf. 318543 ella 518543

ER TAÐ NAKAR
sum eigur eina dvørgvæddderkanin at selja mær. Vinarliga ring
tlf. 311837/224729

Fundir

PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN
hevur Bingo í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 22. september kl. 18.00. Limrnir kunnu taka gest við.
Pensionistafelagið í Havn

FRÁ STÍF
Aðalfundur verður uppaftur tikin mánakvøldið 27. sept 2004 kl. 19 í Strálurúminum í bygdarhúsinum.
Nevndin

TVØROYRAR SVIMJIFELAG
Tvøroyrar Svimjifelag hevur eykaaðalfund í TB-húsinum tann 22. sept. 04 kl. 20.00. Á skránni er lógarbroyting. Um fundurin ikki er viðtøkuførur, verður nýggjur fundur 1/2 tíma seinni.
Tvøroyrar Svimjifelag

Húsarhaldstól

TIL SØLU
Eitt stórt frystiskáp av merkinum »Gram« til sølu fyri 3.000,00.
Tel. 322241/522241 eftir kl. 19

FRYSTIBOKS
Ein Frigo frystiboks, ið tekur 225 litrar, til sølu fyri 1.000 kr. Hon er 4 stjørna (lágorka) og hevur einki brek.
Tlf. 316766

HUSQVARNA KOMFÝRUR
vælhildin hvítur 70 cm. br. við 2 ovnum og keramik plátum (nýprísur 21.800,-) til sølu fyri 4.000,- kr.
Tlf. 316266

BREYÐSKERARAR
Breyðskerarar - Raadvad - til sølu. 250 krónur stk.
Ring 373169 ella 373313

Innbúgv

TIL SØLU
Dupult sovisofa 500 kr. Hornasofa og sofaborð fyri 200 kr.
Tlf. 311603

TIL SØLU
Hvítt WC-toilet og ein brúsubakki 80x90 til sølu.
Tlf. 503249

DUPULTSONG
140x200 cm vid innbygdum radio til sølu fyri 350,- kr.
Tlf. 312329 ella 212803

HVÍTT SKRIVIBORÐ
l. 1,4 m. h. 1.42 m. til sølu fyri 350,- kr.
Tlf. 321530

LARSEN BOXMADRASSA
140 x 200 v/ topmadrassu og boylum, 2 ára gomul, til sølu fyri 1200 kr.
Tlf. 510488

HVÍTT SPÍSIBORÐ
102 cm. br. og 160 cm. l. + 2 plátur á 50 cm. til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 214929, Durið

FLOTT
1 1/2 ára gamalt marmor spísiborð v/ 6 stólum til sølu vegna flyting. Næstan óbrúkt. Nýprísur 12.000,- nú 6.000,-
Tlf. 265017/216517

SVØRT LEÐURSOFA
fæst við at avheinta hana.
Tlf. 316451

TIL SØLU
Grá ungdómssofa 1/2 ára gomul, útsligin 120 x 200. Nýprísur 2.000,- nú 1.000,- kr.
2 nýggjar madrassur 70 x 200 seljast vegna feilkeyps fyri 1500 kr.
Tlf. 319777/519777

ER TAÐ NAKAR
ið eigur eitt hornabaðikar at selja okkum, so ringið á
tlf. 310721

TIL SØLU VEGNA FLYTING
Vegna flyting verður selt ein 1/2 ára gomul boxmadrassa við 4 skuffum og eitt lítið køksborð við eyka plátu og tveimum stólum. Alt so gott sum nýtt. Ringi
Tlf. 221577

TVÆR BRÚKTAR SPRINGMADRASSUR
190x70 til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 313569 eftir kl. 12.00

EIN TJÚKK LATEX
madrassa frá Innovation 140 x 200, sera væl egnað til Futon sovisofur. Einans 1 ára gomul, 2.500,- kr.
Tlf. 221849

SONG TIL SØLU
Dupultsong 140x200 úr hvítlaker-aðum furutræi til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 503983

DUPULTSONG TIL SØLU
vegna plásstrot. Svørt metall song til boxmadrassu, stødd 140x200. Prísuppskot: 200,-
Tlf. 503032

HORNASOFA
ynskist til keyps.
Tlf. 311416/262550

LÚTAÐ FURUSONG
140x200 cm, við tveimum nátt-borðum, bíliga til sølu.
Tlf. 312426 ella 263157

HVÍTT SJÓNVARPSBORÐ
hjólum, B=63, B=72, D=45 cm, við tveimum hillum og einari skuffu niðanfyri, bíliga til sølu.
Tlf. 213058

HVÍTT SJÓNVARPSBORÐ
hjólum, H=55, B=61, D=40 cm, har ovari partur av borðinum kann snarast, 2 hillar og glashurð niðanfyri, bíliga til sølu.
Tlf. 213058

TIL SØLU
Vinyl til sølu, sum nýtt. Prísin kunnu vit tosa um. Tvey skrivaraborð til sølu. Eru í góðum standi. Ring
Tlf. 270127

KLASSISKT VÆLHILDIÐ
Blálitt sofasett 3+2 til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 316138 ella 226988

TIL SØLU
3+2 ráhvítar leðurlook sofur, 2 ára gamlar, til sølu fyri uml. 4000 kr.
Tlf. 581421

TIL SØLU
Fitt brúkt køksborð kr. 200,- lak. 70-80 grammofon plátur 78 umdr. kr. 400,- fyri allar plátturnar, vegna plásstrot.
Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1916/2

STÓRT KAMAR/STOVA
við atgongd til tekøk og bað til leigu beinan vegin í nýggjum húsum við frálíkum útsýni, til friðarligt fólk, ið ikki roykir.
Tlf. 510583

SONG TIL SØLU
Song, (7-14 ár), málað hvít, til støddar 190 x 70 cm, við fjalabotni og nýggjari madrassu, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 311581 eftir kl. 18

SPÍSIBORÐ
v/6 stólum og tveimum eyka plátum til sølu fyri 1.000 kr.
Sofaborð 300 kr.
Reolveggur 300 kr.
Tlf. 214831 ella 314831

Leikur

GER KVETTI
3 Nitro bilar, 4 el-bilar, 1 Nitro speedbátur og 2 el-skip + 4 fjarstýringar og mangt, mangt annað. Nývirði 37.000. Søluprísur 15.000 kr.
Tlf. 214163

TIL SØLU
Fjarstýrdur speedbátur við bensinmotori, báturin er ca. 75 cm., søluprísur 3.000,-. Fjarstýrt skip – ein luxus yacht við tyrlupalli/tyrlu og ljósi. Skipið er 137 cm. langt, tveir motorar.
Tlf. 214163

FJARSTÝRDUR BILUR
El banabilur við øllum tilhoyri, Honda S 2000, toppferð ca. 60 km/t, søluprísur 2.000,-
Tlf. 214163

FJARSTÝRDUR BILUR
Hpi Savege 21 við pullstart, bilurin er 1 ára gamal, men er í góðum standi, 2 gear + bakgear, søluprísur 3.000,-
Tlf. 214163

FJARSTÝRDUR BILUR
til sølu. Bilurin er nýggjur, søluprísur uttan fjarstýring 1200 kr.
Tlf. 214163

LEIKUR TIL SØLU
Lukkupakkar við nógvum ymiskum leikum, so sum bilar, menn og annað bert 20,-, 50,- og 100,- kr. Er pakkað í posar.
Tlf. 583388

Lutaseðlar

VINNINGARNIR AV NEYTALORTAKAPPINGINI
fullu seðlaðis:
1/2 kroppur á 177,
1/4 kroppur á nr. 178
og 1/4 kroppur á nr. 176.
LÍF

8B í RUNAVÍKAR SKÚLA
2 vinningar eru ikki avheintaðir – nr. 3470 og 549. Siðsta